Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 27.11.2025 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Magnus Skoralíð<br>Hanna Jensen<br>Ann Fugløø<br>Heri Mikálsson<br>Pól í Skorini<br>Unn Jarnskor Ellingsgaard<br>Tórur Didrik Djurhuus<br>Uni Rasmussen |
| Varalimir: | Pól í Skorini hevur boðað frá at hann ikki kann møta til fundin. Jan á Líknargøtu hevur tikið sæti fyri hann. |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| Málsyvirlit | | | Síða |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerð:** | | | |
| 57/25 | 25/00479-2 | Til ummælis - Umsókn um keyp av undirlendi til neystagrund - matr. nr. 194a í Leirvík - Búnaðarstovan | 3 |
| 58/25 | 25/00491-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini - Við Ánna í Norðragøtu | 4 |
| 59/25 | 25/00495-1 | Broyting av býarætlan undir Gøtueiði | 6 |
| 60/25 | 24/00365-2 | Umsókn um keyp av parti av matr. nr. 215a í Syðrugøtu | 8 |
| 61/25 | 25/00425-1 | Frágreiðing og tilmæli - Umbøn um eykajáttan til konto 320 - børn við serligum tørvi | 10 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 62/25 | 25/00430-1 | Fíggjarætlan 2026 | 12 |
| | | | |

**Til viðgerð:**

## 57/25 Til ummælis - Umsókn um keyp av undirlendi til neystagrund - matr. nr. 194a í Leirvík - Búnaðarstovan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.11.2025 | 32/25 | 25/00479-2 |
| 2 Býráðið | 27.11.2025 | 57/25 | 25/00479-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn frá Búnaðarstovuni dagfest 3. novembur 2025, har kommunan verður biðin um at ummæla eina umsókn um keyp av undirlendinum av einum neysti í liggur á matr. nr. 194a í Leirvík.<br><br>Eigari av matr. nr. 194a er Føroya Jarðargrunnur, og er neystagrundin útleigað gjøgnum Búnaðarstovuna.<br><br>Ætlanin við umsóknini er at selja undirlendi á neystinum, burtur av matr. nr. 194a og at neysti fær egið matrikulnummar.<br><br>Umrødda stykkið/neystagrundin er staðsett í Leirvík, beint innan fyri Fjøruvegin.<br><br>Skjøl í málinum eru viðfest. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at geva Búnaðarstovuni loyvi at selja tann partin av undirlendinum av matr. nr. 194a har neysti er bygt. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. november 2025**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 27. november 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 58/25 Broyting av almennu byggisamtyktini - Við Ánna í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.11.2025 | 33/25 | 25/00491-1 |
| 2 Býráðið | 27.11.2025 | 58/25 | 25/00491-1 |

**Málslýsing:**

**Upprunin til málið**
Vegurin fram Við Ánna var upprunaliga landsvegur, inntil nýggi vegurin varð gjørdur í 1970'unum.

**Lýsing av málinum**
Vegurin fram Við Ánna er í dag høvuðsvegur í Norðragøtu, har fleiri vegir og gøtur úr bygdini omanfyri knýtast í. Ferðslan er tískil nógv og vaksandi.

Ynskiligt er at varðveita verandi útsjónd og  verandi bygging fram Við Ánna og samstundis fyribyrgja, at bygging fer fram heilt út at vegamarkinum. Vegurin er smalur, og útsýnið hjá ferðsluni er avmarkað, serliga á støðum har garðar longu standa nær vegnum. Um bygningar o.a. verða settir upp nærri enn 10 metrar frá vegi, kann hetta munandi versna um útsýnið og økja vandan í ferðsluni.

Ætlanin er tí at leggja eina bindandi 10 metra byggilinju frá markinum á vegnum fyri allar viðkomandi matriklar, sum liggja í bústaðarøkjum. Hetta verður innarbeitt í almenna byggisamtyktina fyri kommununa.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Verandi byggisamtykt fyri øki er soljóðandi:

### § 3. Ásetingar fyri øki B: Bústaðarøki.

1. Økið umfatar gomul og nýggj bústaðarøkir.

Loyvt er at nýta hús til handlar, smærri vinnuendamál, ið kunnu staðsetast millum bústaðir og stovnar treyta av at hetta ikki er til ampa (t.d. við øktari bilferðslu
økinum sum sethúsabýlingur. Bústaðarøki er umhvørvisflokkað í 1. flokki, sí Umhvørvisflokking fyri Eysturkommunu.

2. Á grundstykkjum minni enn 300 $m^2$ verður byggiloyvi ikki givið. Tó eru undantøk fyri grundøki, eldri enn 1. januar 2012.

Byggistigið fyri grundstykki uppá 300 $m^2$, verður sett til 0,4 og lutfalsliga fallandi við vaksandi grundstykkjastødd til 0,3 fyri 500 $m^2$ og størri.

3. Um verandi bygging á grundstykkjum minni enn 500 $m^2$ verður niðurtikin kann bygdarráðið loyva, at nýbygging fer fram í somu stødd sum undan farna byg
ikki er til ampa fyri grannaognir.

4. Hús mugu ikki vera hægri enn 5 m til yvirgrind og 8,5 m til mønuna, mált frá miðal jørðildi. Byggivaldið ásetur kotuna á lægsta gólvi. Tá møn á húsum er úti
bygningum, kann byggivaldið krevja at frástøðan til grannamark er í minsta lagi 5 metur.

5. Eftir góðkenning frá byggivaldinum verður loyvt at umvæla verandi sethús og byggja afturat teimum, t.d. durur, baðirúm o.t., so tey eru hóskilig til nýtímans

Ætlaðu broytingarnar fevna um eitt nýtt punkt 6, sum verður lagt aftrat.

6. *Bygningar og aðrir bygningslutir mugu ikki verða bygdir nærri enn 10 metur frá vegnum Við ánna í Norðragøtu. Galdandi fyri hesar matriklar: 111b, 79f, 110c,*

*110b, 109d, 109b, 92g, 92e, 92d, 92c, 97, 92h, 92b, 96, 95b, 95m, 95n, 94c, 94d, 89h, 89d, 89b, 66b, 83b, 82, 81, 79c, 141b, 141a og 141e.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Á nøkrum matriklum er bygt innan fyri 10 metur byggilinjuna, hesir eru 115a, 115e, 88e, 92e, 92d, 97, 92h, 95m og 141a í Norðragøtu. Bygging á omanfyri nevndu matriklum vera sum verandi, men framyvir verður ikki givið loyvi at gera útbyggingar ella byggja aðrar bygningar innanfyri 10 metur byggilinjuna, tó kunnu verandi bygningar umvælast.

**Skjøl**
Sí viðfesta kortskjal – Broyting av almennu byggisamtyktini – Við Ánna í Norðragøtu.

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at taka undir við broytingunum og seta hetta í verk. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. november 2025**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini við tí broyting, at byggilinjan liggur 8 metur frá vegmarkinum.

**Býráðið 27. november 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 59/25 Broyting av býarætlan undir Gøtueiði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.11.2025 | 34/25 | 25/00495-1 |
| 2 Býráðið | 27.11.2025 | 59/25 | 25/00495-1 |

**Málslýsing:**

**Upprunin til málið**
Arbeitt hevur í longri tíð verið við at menna og skapa betri karmar fyri vinnuvirksemi undir Gøtueiði. Í tí sambandi er tørvur á at umskipa eitt ávíst øki ovast í bygdini soleiðis, at tað kann nýtast til lættari vinnu, tænastur og møguliga ferðavinnu.

**Lýsing av málinum**
Ætlanin við málinum er at umskipa grundøkini ovast í bygdini til vinnuøki í umhvørvisflokki 1 og 2. Hetta ger tað møguligt at nýta økið til m.a. hotellvirksemi, handilsvirksemi og annað líknandi lættari vinnuvirksemi. Umskipanin er í samsvari við heildarætlanina fyri Undir Gøtueiði.

Økið er staðsett soleiðis, at tað liggur væl fyri til ætlaða vinnuvirksemi og er uttan fyri verandi bústaðarøki. Ferðslan, sum fylgir við virkseminum, verður sostatt leidd uttan um bústaðarøkið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Fyri økið eru galdandi hesi verandi ásetingar:

### § 3. Ásetingar fyri øki B: Bústaðarøki.

1. Økið umfatar gomul og nýggj bústaðarøkir.

Loyvt er at nýta hús til handlar, smærri vinnuendamál, ið kunnu staðsetast millum bústaðir og stovnar treyta av at hetta ikki er til ampa (t.d. við øktari bilferðslu
økinum sum sethúsabýlingur. Bústaðarøki er umhvørvisflokkað í 1. flokki, sí Umhvørvisflokking fyri Eysturkommunu.

2. Á grundstykkjum minni enn 300 $m^2$ verður byggiloyvi ikki givið. Tó eru undantøk fyri grundøki, eldri enn 1. januar 2012.

Byggistigið fyri grundstykki uppá 300 $m^2$, verður sett til 0,4 og lutfalsliga fallandi við vaksandi grundstykkjastødd til 0,3 fyri 500 $m^2$ og størri.

3. Um verandi bygging á grundstykkjum minni enn 500 $m^2$ verður niðurtikin kann bygdarráðið loyva, at nýbygging fer fram í somu stødd sum undan farna byg
ikki er til ampa fyri grannaognir.

4. Hús mugu ikki vera hægri enn 5 m til yvirgrind og 8,5 m til mønuna, mált frá miðal jørðildi. Byggivaldið ásetur kotuna á lægsta gólvi. Tá møn á húsum er útið
bygningum, kann byggivaldið krevja at frástøðan til grannamark er í minsta lagi 5 metur.

5. Eftir góðkenning frá byggivaldinum verður loyvt at umvæla verandi sethús og byggja afturat teimum, t.d. durur, baðirúm o.t., so tey eru hóskilig til nýtímans

Fylgjandi verða nýggju ásetingarnar fyri økið:

## § 2. Ásetingar fyri øki A: Miðstaðarendamál.

1. Økið verður lagt burtur av til miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovur, heilsubótarstovur, bústaðir, stovnar o.t., ið hóskar inn í eitt miðstaðarøki.

Nýtslan av byggingini í veghædd, har miðstaðarbyggingin verður mett at verða, skal hava útatvenda nýtslu, ið hóskar inn í eina miðstaðarbygging.

2. Byggistigið má ikki fara upp um 0,5. Byggivaldið kann seta treytir í mun til hæddir í veghædd og á 1. hædd, ið passa til miðstaðin.

3. Bygningar skulu ikki verða hægri enn 7m til yvirgrindina og 10m til mønuna, mált frá miðaljørildi (í miðal við húsahornini). Bert ein kjallarahædd er loy

4. Frávik kunnu verða gjørd frá ásetingunum í 2. og 3. stk. í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, náttúrliga avmarkað økið. Í serstakari byggisamtykt kan

**Upplýsingar frá umsitingini**
Talan er um øki, sum í dag er partur av B – Bústaðarøki, hetta krevur at býarætlanin fyri økið má broytast til A – Miðstaðarøki. Umskipanin fevnir um hesar matriklar undir Gøtueiði:

- 281c, 281d, 281e, 281f, 281g, 281h, 281i og 281k og umleið 1300 fermetrar av matr. nr. 281a

Kloakk, vatn, el og aðrir tekniskir skipanir eru í løtuni ikki framlagdir til økið. Harumframt er vegurin til økið ikki gjørdur liðugur.

**Skjøl**
Viðfest er skjal nr. 251117_BS_EK-Undir Gøtueiði

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
| --- |
| 5.000.000,- kr. (meting um vegur skal gerast) |

| **Tilmæli** |
| --- |
| Umsitingin mælir til, at taka undir við omanfyri broytingum og at seta hesar í verk. |

**<u>Byggi - og býarskipanarnevnd 19. november 2025</u>**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir tilmælinum hjá umsitingini.

**<u>Býráðið 27. november 2025</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

## 60/25 Umsókn um keyp av parti av matr. nr. 215a í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.05.2024 | 21/24 | 24/00365-2 |
| 2 Býráðið | | | 24/00365-2 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.11.2025 | 31/25 | 24/00365-2 |
| 4 Fíggjarnevnd | | | 24/00365-2 |
| 5 Býráðið | 27.11.2025 | 60/25 | 24/00365-2 |
| 6 Fíggjarnevnd | 24.11.2025 | 42/25 | 24/00365-2 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur móttikið umsókn frá eigaranum av matr. nr. 215g í Syðrugøtu. Eigarin ynskir at keypa ein part av matr. nr. 215a har teirra innkoyring er til kjallaran í húsini, talan er um áleið 128 fermetrar.

Sí skjøl í málinum.

Umsitingin mælir til, at selja áleið 128 fermetrar av 215a og leggja hesar aftrat 215g, sum víst á korti.

**Ískoyti 19.11.2025**

Eysturkommuna hevur fingið áheitan frá Matrikulstovuni, at tað er ikki møguligt at fremja ætlaðu søluna tí marki gongur inná annað øki í byggisamtyktini. Matr. nr. 215g liggur í øki B (Bústaðarøki) og matr. nr. 215a í øki B1 (Alternativ íbúðarbygging).

Fyri at kunna fremja ætlaðu søluna er neyðugt at býráði gevur fráviki, við at Eysturkommuna broytir býarætlanina fyri Syðrugøtu eftirfylgjandi.

**Lógir og ásetingar:**

Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022. §.17 stk.2. geva undantaksloyvi til góðkendu byggisamtyktina.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Ongar

**Tilmæli**

Mælt verður til, at taka undir tilmælinum hjá umsitingin.

**Ískoyti 19.11.2025**

| |
|---|
| Umsitingin mælir til, at geva frávik og broyta býarætlanina. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. maj 2024**
Byggi- og býraskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. november 2025**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 24. november 2025**
Fíggarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipåananevndini.

Unn Jarnskor Ellingsgaard var úti undir viðgerðini vegna ógegni

**Býráðið 27. november 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini

Unn Jarnskor Ellingsgaard var úti undir viðgerðini vegna ógegni.

## 61/25 Frágreiðing og tilmæli - Umbøn um eykajáttan til konto 320 - børn við serligum tørvi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 18.09.2025 | 13/25 | 25/00425-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.11.2025 | 43/25 | 25/00425-1 |
| 3 Býráðið | 27.11.2025 | 61/25 | 25/00425-1 |

**Málslýsing:**

Á fíggjarætlanini 2025 er kr. 2.000.000 avsettar á konto 320 – *Børn við serligum tørvi.*

Til tann tørv, vit hava á dagstovna – og frítíðarøkinum, umframt Skúlaspíranum í mun til børn, sum hava serligan tørv, er tað trupult at halda okkum innanfyri verandi játtan.

Fram til ultimo august 2025 er 1.900.000 av játtanini longu brúkt og er tørvurin størri eftir summarferiuna.

Hetta ger sum sagt, at tað ikki er møguligt at halda okkum innanfyri verandi játtan, um vit skulu geva hesum børnum eitt nøktandi tilboð og er tí neyðugt við eini eykajáttan.

| | | |
|---|---|---|
| Ætlan 2025 | kr. | 2.000.000 |
| Brúkt fram ultimo august | kr. | 1.900.000 |
| Vænta forbrúk sept. okt. nov. des. 2025 | kr. | 1.400.000 |
| **Mett eykajáttan** | **kr.** | **1.300.000** |

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Mælt verður til at eykajáttan verður gjørd á kr. 1.500.000

**<u>Trivnaðarnevndin 18. september 2025</u>**

Mæla til eykajáttan á kr. 1.300.000

**<u>Fíggjarnevnd 24. november 2025</u>**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini.

**<u>Býráðið 27. november 2025</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini og fíggjarnevndini.

## 62/25 Fíggjarætlan 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.09.2025 | 52/25 | 25/00430-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.09.2025 | 37/25 | 25/00430-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 24.11.2025 | 44/25 | 25/00430-1 |
| 4 Býráðið | 27.11.2025 | 62/25 | 25/00430-1 |
| 5 Fíggjarnevnd | | | 25/00430-1 |

**Málslýsing:**

Víst verður til fyriliggjandi skjøl til 1. viðgerð av fíggjarætlan fyri 2026.

**Ískoyti 25/11-2025**

Víst verður til fyriliggjandi uppskot frá fíggjarnevndini har høvuðstølini eru hesi:

| | |
|---|---|
| Inntøkur íalt | 151.781.000,00 |
| Rakstrarútreiðslur | 129.539.000,00 |
| Rentuútreiðslur | 4.975.000,00 |
| Útr. til rentustuðul | 3.000.000,00 |
| Íløgur | 45.400.000,00 |
| RLÚ | -31.133.000 |
| Avdráttir | 10.952.000,00 |

Barnafrádrátturin hækkar frá 9.000,00 til 9.500,00 kr.
Skattaprosentið verður óbroytt 19,9

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Mælt verður til at beina málið í føstu nevndinar til víðari viðgerð.

**Fíggjarnevnd 22. september 2025**

Fíggjarnevndin mærlir til at beina málið í føstu nevndirnar til viðari viðgerð

**Býráðið 25. september 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevnd 24. november 2025**
Fíggjarnevndin mælir til at samtykkja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri 2026.

**Býráðið 27. november 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri 2026, við tí broyting at íløgurnar verða hækkaðar við 8 mió. til 53,4 mió.

fundurin lokin 19.00

Per Martin Gregersen

Magnus Skoralíð

Hanna Jensen

Ann Fuglø

Heri Mikálsson

Jan á Líknargøtu

Unn Jarnskor
Ellingsgaard

Tórur Didrik Djurhuus

Uni Rasmussen